# l í fjúsið



*r ein viðfevndan sáttmála, sum skulu gera*
*tað er hendan avtalan, sum nú er blivin*

fyrsta ikki hevur ráðført seg við uttanlandsnevndina um tollavtaluna, og fyri tað næsta kann uttanlandsnevndin ikki taka støðu vegna løgtingið, tá ið avtalur eru tengdar at luttøkuni hjá løgtinginum ella eru av týdningarmiklar.

Sambært stýrisskipanarlógini skulu allar týðandi millumtjóðaavtalur góðkennast av løgtinginum, áðrenn tær verða settar í gildi. Um lógarbroytingar eru tengdar at avtaluni, skal løgtingið verða við, og tað sama er galdandi um avtalan verður mett at vera týdningarmikil.

– Metingin av, um ein sáttmáli er týdningarmikil í stýrisskipanarligum týdningi, liggur í fyrstu syftu hjá løgmanni og í síðsta enda í løgtinginum, skrivar Kristina Samuelsen, nevndarskrivari, í sínum viðmerkingum.

### Mælir til kanningarstjóra

Løgmaður metti ikki, at talan var um eina so týdningarmikla avtalu, at hon skuldi leggjast fyri løgtingið at verða góðkend, áðrenn hon kundi koma í gildi. Harafturat heldur løgmaður heldur ikki, at neyðugt er við lógarbroytingum.

Løgmaður spurdi Toll- og Skattstovuna um hetta, og svarið frá Toll og Skatt var, at tað er ikki neyðugt við lógarbroytingum fyri at seta tollavtaluna í gildi.

Løgtingsskrivstovan heldur hinvegin, at tað er sera ivasamt, um landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur heimild at gera fyriskipan um at taka av tollin á til dømis mjólk, ið verður innflutt til Føroya úr Íslandi, fyrr enn sáttmálin um frælsa flyting av vørum er lagdur fyri og góðkendur av løgtinginum.

Hergeir Nielsen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin, heldur, at talan er um álvarsligt mál, og hann segði í gjár við Útvarpið, at hann ætlar sær víðari við málinum.

Hergeir Nielsen helt, at frægasta loysnin var at seta ein kanningarstjóra at kanna heimildirnar hjá løgmanni. Fyri at løgtingsformaðurin skal seta ein kanningarstjóra skal ein áheitan koma frá tveimum fimtapartum av løgtingslimunum.

### Stýrisskipanarlógin

§ 52. Landsstýrið hevur málsræði í førum, sum heimastýrinum er heimilað at tingast við og gera avtalur við onnur lond.

Stk. 2. Uttan samtykki løgtingsins kann landsstýrið tó ikki gera avtalur, sum krevja luttøku løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar.

Stk. 3. Samstundis sum slík avtala verður løgd fyri løgtingið til góðkenningar, boðar landsstýrið frá, hvørjar løgtingslógir og hvørji ríkislógartilmæli, neyðug eru, til tess at millumlandasáttmálin kann verða útintur.

# eina átalu

Bjørn á Heygum heldur ikki, at tað kundi gingið hampiliga skjótt hjá løgmanni at lagt málið fyri tingið og tryggja sær tingsins góðkenning.

– So hevði løgmaður loyst allar trupulleikar og hevði tryggjað seg ímóti mistøkum. At pilka ein sáttmála sundur, soleiðis, sum løgmaður hevur gjørt í hesum føri, er eitt ógvuliga vandamikil leið at koma inn á.

– Tað hevði verið rættari av løgmanni at handfarið málið soleiðis, at tað ikki bar til at sáa iva um mannagongdina.

### Neyðugt við greiðum mannagongdum

Bjørn á Heygum vísur á, at hetta málið vísir, at ósemja er ímillum umsitinginia hjá løgmanni, sum tilkar málið so, at hann hevur heimildina og so umsitingina hjá uttanlandsnevndini, sum setir spurnartekin við tað.

– Tað rættast hevði kanska verið at lagt málið fyri landsstýrismálanevndina, sum so kundi komið til eina niðurstøðu.

Í øllum førum heldur Bjørn á Heygum avgjørt ikki at eitt møguligt mistak er so stórt, at tað eigur at fáa avleiðingar fyri løgmann.

– Hetta er framvegis ein tulkingarspurningur og vit kunnu vera rættiliga vís í, at tað er ikki við beráddum huga, at løgmaður kanska hevur sett stýrisskipanina til viks, so linnandi umstøður eru eisini í málinum. Tí kann tað í mesta lagi enda við eini átalu.

Hinvegin heldur løgfrøðingurin at tað hevur sera stóran týdning, at stýrisskipanin verður hildin.

Tí heldur hann, avgjørt, at løgtingið eigur at taka málið upp og gera greiðar mannagongdir fyri, hvussu slík mál skulu avgreiðast.

– Onki samfelag kann liva við, at ivi í heilum verður skal vera sáddur um, antin stýrisskipanin er brotin ella ikki og tí eiga greiðar mannagongdir at verða gjørdar, heldur Bjørn á Heygum.

# Liggur í hondunum á løgtinginum

**Hjá mær er málið avgreitt og nú stendur tað til løgtingið at gera av, hvørja lagnu tað skal fáa, sigur formaðurin í uttanlandsnevndini**

ÍSLANDSSÁTTMÁLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Løgtingslimir hava fingið eina lýsing av málinum og hjá mær er málið avgreitt, sigur Johan Dahl*

Eg geri ikki meiri við málið. Skal meiri gerast við tað, má løgtingið gera tað.

Johan Dahl, formaður í uttanlandsnevndini, sigur, at hjá honum er spurningurin um heimildirnar hjá løgmanni í sambandi við íslandssáttmálan, avgreitt.

– Vit hava gjørt okkara so nú stendur tað til løgtingið at gera av, um nakað meiri skal henda i málinum, sigur hann.

Hann heldur annars, at løgmaður eigur at leggja íslandssáttmálan fyri løgtingið, so at tingið kann viðgera hann.

– So er málið avgreitt og meiri havi eg ikki at siga um hann.

– Eg havi gjørt tað, sum formaðurin í uttanlandsnevndini eigur at gera og tað er at fáa tað lýst.

– Nú hava løgtingslimir so fingið úrslitið og so stendur tað til teir, um meiri skal gerast við tað.

Kortini ásannar hann at hann veit ikki, hvat sáttmálin frá 2. september um tollfrælsi fyri vørur, skuldi til, tí tað er eisini umfatað av tí fyrra sáttmálanum og løgmaður eigur at leggja hann fyri tingið og at fáa málið avgreitt, sigur Johan Dahl.


## Hi-Fi

damor

**LG 20" LCD sjónvarp**




Sera snøgt LCD sjónvarp frá LG. Við sera góðari mynd
Vanligur prísur: 5.498,-

**Thomson 28" sjónvarp**




28" sjónvarp við scart stikk, Avinngangi framman og fjarstýring
Vanligur prísur: 3.498,-

**LG Surroundanlegg v/ DVD og Video**




Sera kompakt surroundanlegg við DVD, video og útvarpi. Umframt DVD spælir hann eisini DivX og Xvid filmar. Hevur eina total effekt uppá 840W

**LG DVD spælari**




Snøggur dvd avspælari ið umfram DVD spælir mp3, WMA, jpeg og DivX

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor